## DAGSINS MEINING

### Vegamót?

Hóast morð og dráp framhaldandi eru gerandiskostur í Ísrael røkist okkurt tó fyri friði ella tí sum líkist vápnahvíld. Víðgondu palestinsku bólkarnir siga seg nú sinnaðar at leggja vápnini í einar tríggjar mánaðir, um Ísrael afturfyri heldur uppat at drepa leiðarar teirra.

Nú eru vit so von við at vápnahvíldir halda bert í eina tíð, tí so torført er at fáa allar teir ymsu palestinsku bólkarnar at standa saman. Men sum tað ljóðar eru teir sinnaðir til at gera eina roynd. Hetta er gott fyri allar partar og um teir megna at halda tað teir lova kemur tað at liggja ómetaliga stórt trýst á ísraelsku stjórnini eitt nú at steðga nýggjum búsetingum og at leggja niður tær, sum eru komnar í seinastuni.

Vit vóna so inniliga, at palestinar megna sín part av avtaluni, tí tá er porturið fyri friði og eini semju veruliga latið upp. Tá eru ísraelar tvingaðir og verður helst øgiligt trýst lagt á teir uttanífrá at vísa vilja til semju við palestinar. Hetta má vísast í verki og sum sagt eiga búsetingarnar sum tað fyrsta at stegða. Og haraftrat mugu ísraelar so smátt fara undir at taka seg aftur av hertiknum landi.

Tað næsta verður so at leggja lunnar undir tann palestinska statin, sum má og skal gerast veruleiki.

Umheimurin við Europa og USA á odda má nú halda fast í ísraelar, soleiðis at Sharon ikki sleppur at koyra solospæl. Tí mugu teir víðgongdu í Ísrael setast uppá pláss eins og hjá palestinum. Tað ber ikki til at hesir víðgongdu, sum liggja langt til høgru fyri Sharon sleppa at brúka sín demokratiska rætt til at steðga friðarætlanini. Tá má eitt nýtt demokrati skipast so ella so ella má Arbeiðaraflokkurin bjóða seg fram til at stýra saman við Likud. Tað stutta av tí langa er, at ultrahøgravendu smáflokkarnir í Ísrael mugu temjast eins væl og teir víðgongdu bólkarnir hjá palestinum. Megna hóvligu palestinarnir at stegða sínum heykum, so má og skal tann hóvligari parturin av ísraelsku stjórnini til at steðga sínum heykum. Tað er lykilin til frið í Ísrael, um so er at Hamar og Jihad ol. leggja vápnini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rækjuvinnan og almennur studningur

**Abraham Mikladal**
*abraham@kallnet.fo*



Nú hoyrdu vit tað aftur, vit ið eru nóg gomul til at minnast 80'ini. Tað almenna má traðka til og veita studning tí ein partur av fiskivinnuni er í kreppu

Í 80'unum brúkti tað almenna nærum eina milliard um árið til stuðul til fiskivinnuna á landi og sjógvi. Og hóast hesa stóru upphædd vóru øll virki og skip skuldarbundin upp um háls og herðar.

Tá so fiskiskapurin sveik, fór alt so ruddiliga av knóranum. Tað almenna mátti taka upp eftir gildið og átaka sær skuld upp á seks til sjey milliardir krónur.

Nú hoyra vit aftur teir tá so, vælkendu tónarnar "At samfelagsvirðir eru í stórum vanda", "At rækjuvinnan er í kreppu", "At alt steðgar upp, um rækjuvinnan ikki fær almennan pening", "At útrokningar vísa, at hundraðtals ársverk fara fyri skeytið, um einki verður gjørt" o.s.fr.

Men eru vit ikki júst so dánt komin úr planbúskapinum inn í ein marknaðarbúskap?. Og eru fortreytirnar í marknaðarbúskapinum ikki, at vinnur mugu virka undir teimum til eina og hvørja tíð galdandi fortreytum?

Hvat missa føroyingar og Føroyar, um rækjuflotin fer av knóranum?

Allarhelst einki ella í øllum førum lítið og einki.

So hvørt skipini fara undir hamaran, verða tey skuldarsanerað og keypt aftur av somu ella øðrum persónum fyri eina upphædd, ið er nógv lægri og lættari at forrenta, enn hon er í dag. Møguliga nøkur skip fara av landinum, men so verða onnur keypt inn í flotan í staðin.

So leingi rækjur eru at fiska, verða íløgur gjørdar í skip at fiska tær.

Mær vitandi hevur hugurin til rækjuveiðu verið so stórur millum føroyingar, at tað hevur verið trupult hjá felagnum "Rækjuskip" at sannført landsstýrismannin í fiskivinnumálum um ikki at útskriva fleiri loyvir til rækjufiskiskap. Tað liggja nógvar umsóknir í Fiskivinnumálaráðnum.

So stúrið ikki - keyparar standa í kø at keypa, so hvørt rækjuskipini fara undir hamaran.

Niðurstøðan er greið. Eingin steðgur kemur í rækjuveiðina, og vit fáa ein rakstarbetri rækjuflota.

# Fregnir uttast til høgru

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Oddagreinin í Fregnum í síðstu viku við yvirskriftini "Arbeiðarafjøldin misleidd" var ikki tespiligur lesnaður. Eitt er at oddagreinin partvís var eitt álop á Javnaðarflokkin, men tað sum verri er, var sjúkliga og hatska álopið á arbeiðarafjøldina, fakfeløg og fakfelagsleiðarar tess. Onki navn stóð undir oddagreinini, sum er sera útssaligt, tá man legst eftir navngivnum fólki á sera niðrandi hátt. Nakrar dagar áðrenn Fregnir kom út, møtti eg einum av føstu oddagreinsskrivarunum á blaðnum, og hann gav mær, Javnaðarflokkinum, arbeiðarafjøldini og leiðarum tess av grovfílini við somu sjónarmiðum og við somu dømun sum í oddagreinini. Hann kann tó neyvan hava skrivað oddagreinina, tí hann er m.a. kendur fyri sína mótsstøðu ímóti teimum í goyma seg aftan fyri dulnevni, ella hvussu?

Tey, sum vilja fakfelagsrørsluni væl og allir demokratar eiga at lesa oddagreinina, um tey ikki longu hava lisið hana. Eg leggi ikki í at endurgeva úr henni, men hon sigur nakað um eina ótespiliga gongd í samfelagnum. Niðurstøðan í greinini var, at løgtingið átti at skerja valdið hjá demokratiskt valdum fakfelagsleiðslum, ið sambært dulnevnda høvundan, fremja undirgravandi virksemi. Fregnir, ið má roknast sum málgagn hjá fullveldisvonginum, eggjar sostatt sínum løgtingsumboðum til at skerja einasta veruliga vápnið, ið arbeiðsfólk eiga, demokratiska rættin at fara í verkfall.

Arbeiðsfólki og øðrum skilafólki nýtist tíbetur ikki at lata seg villleiða av fullveldisblaðnum og slíkum, ið altíð skíra stríðið hjá arbeiðsfólki fyri betri korum fyri undirgravandi virksemi. Arbeiðara- og fakfelagsrørslan hevur frá byrjan av, gingið á odda í stríðnum fyri betri og rættvísum korum hjá fjøldini. Søgan um hvussu rørslan mentist og tann demokratiska sosialistiska hugsjónin, vóru andaligi førningurin og drívmegin. Tann veruleikin er væl og virðiliga dokumenteraður og letur seg ikki redigera av Fregnum og tess spinndoktarum.

Skulu vit tosa um at undirgrava, so eru tað júst slíkir, sum hesin feigi oddagreinsskrivarin, ið situr dulnevndur í skímaskoti, ið undirgrava demokratiið.

Ágangurin á fakfeløg og vunnin rættindi, bæði rættindi á arbeiðsmarknaðinum og politisk rættindi, hevur altíð verið stórur og verður ikki minni framyvir, sum oddagreinin í Fregnum ber boð um.

Demokratisk rættindi, ið arbeiðsfólk og arbeiðaraflokkar hava stríðst seg til í felag, mugu tí eisini í framtíðini verjast og mennast í felag og enn er langt á mál og nógv at stríðast fyri, áðrenn vit øll m. a. hava javnbjóðis rætt til arbeiði, útbúgving, bústað og til at liva og virka í heilsugóðum umhvørvi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Hevur trekt tenninar úr mest víðgongdu føroyingunum

**– Nýggja avtalan um yvirtøkur er eitt hent skjal, men í veruleikanum, hevur Anders Fogh Rasmussen ikki latið føroyingum nakað serligt, sigur Jóannes Eidesgaard**

TVØRASÁTTMÁLIN
*Áki Bertholdsen*



*– Tvørasáttmáliner eitt meistarligt, taktiskt trekk hjá Anders Fogh Rasmussen, tí hann hevur í grundini ikki latið føroyingum nakað. Men hann hevur so klárað at kyrt teir mest stríðshugaðu føroyingarnar- og tað gjørdi hann í ríkisfelagsskapinum, sigur Jóannes Eidesgaard*

– Danski forsætisráðharrin hevur dugað meistarliga væl at trekt tenninar úr teimum mest víðgongdu føroyingunum á politiska loysingarvonginum.

Jóannes Eidesgaard, formaður í javnaðarflokkinum, heldur, at avtalan um yvirtøkulógina, sum varð undirskrivað á Tvøroyri hósmorgunin, er eitt gott dømi um hetta.

Men tað verður so langt frá, at hann fer at liggja í andvekri av, at Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen nú hava undirskrivað eina ætlanarfráboðan um at gera eina yvirtøkulóg.

– Tvørasáttmálin er uttan iva eitt hent skjal. Men í veruleikanum broytir hann ikki nógv og tað kann ikki sigast, at Anders Fogh Rasmussen hevur givið føroyingum nakað serligt.

– Tað einasta, hann hevur gjørt, er, at hann hevur fingið føroyingar at ásanna ein politiskan veruleika, sum í roynd og veru hevur verið galdandi heilt síðani 1948, tí yvirtøkuleisturin hevur galdandi líka síðani tá.

– Og so megnaði hann eisini at kyrrað teir mest víðgongdu føroyingarnar, og tað gjørdi hann í ríkisfelagsskapinum.

### Avgera sjálvir

Jóannes Eidesgaard sigur, at yvirtøkulógin verður ein endalig staðfesting av, at tað er Løgtingið, sum einsamalt ger av, hvørji málsøki skulu yvirtakast og, nær tey skulu yvirtakast.

– Og hetta er í fullum samsvari við sjálvstýrislógina hjá hjá javnaðarflokkinum, tí eftir henni skuldi Løgtingið einsamalt hava evsta vald í spurningunum um yvirtøkur.

Men formaður javnaðarfloksins sigur eisini, at í veruleikanum broytir Tvørasáttmálin ikki nakað stórvegis.

Hann ger tó vart við at í gjáramorgunin hevði hann ikki lisið sáttmálan sjálvur, so hansara viðmerkingar eru bygdar á tað, hann hevur lisið og hoyrt í fjølmiðlunum.

– Eftir tvørasáttmálanum skulu føroyskir og danskir myndugleikar gera eina avtalu um, hvussu farast skal fram, tá ið málsøki skulu yvirtakast.

Og grundarlagið undir tí avtaluni skal vera, at føroyingar skulu kunna yvirtaka øll málsøki, tá ið vit vilja.

Hetta er tó ikki galdandi fyri tey málsøki, sum eru beinleiðis undir ríkinum, tað eru hernaðarmál, uttanríkispolitikk og statsborgaraskap.

– Fyrr hava vit havt ein lista í heimastýrislógini sum sigur, hvørji mál, vit kunnu yvirtaka. Hetta verður nú broytt so at vit fáa ein lista við nøkrum fáum málsøkjum, sum vit ikki kunnu yvirtaka.

– Hetta verður uttan iva ein hent lóg hjá føroyingum at hava. Men vit mugu ásanna, at hon broytir ikki stórvegis, tí soleiðis hevur tað so at siga altíð verið í veruleikanum. Vit hava altíð kunna yvirtikið mál og vit hava eisini yvirtikið nógv mál, uttan nakað sum helst hóvasták, eisini málsøki, sum vit hava skula samráðst við danir um. Telesamskiftið, havumhvørvi og skipasýnið eru nøkur dømi, seinastu árini.

– Tað hevur í ávísan mun eisini verið ein spurningur um politiskt handalag og tað er merkisvert, at einastu málsøki, sum vit hava havt trupulleikar av, eru tey, sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, hevur umsitið, eitt nú fjølmiðlaábyrgdarlógina.

### Trekt tenninar úr føroyingum

Jóannes Eidesgaard sigur, at hendan yvirtókulógin er ein endalig staðfesting av, at ætlanin er at broyta ríkisfelagsskapin.

– Men tað er umráðandi at gera vart við, at øll málsøki vera ikki yvirtikin á ólavsøku.

– Tað verður altíð Løgtingið, sum ger av, nær vit skulu yvirtaka eitt málsøki og tær avgerðirnar fara altíð at vera tiknar út frá teimum fíggjarligu umstøðunum.

– Og sum búskaparligu útlitini eru nú, er tað ikki nógv sum talar fyri at tað eru umstøður fyri at gera tær mest kostnaðarmiklu yvirtøkurnar, eitt nú løgreglu og rættarmál, sum kosta næstan 100 milliónir, sigur formaður javnaðarfloksins.

Hann heldur, at ein stórur fyrimunur við hesi lógini er, at nú er ein stórur partur loystur av teimum stóru stríðsmálini, sum hava tært viðurskiftini ímillum føroyingar og danir.

– Tað má sigast til rós fyri danska forsætisráðharran, at hann hevur duga ómetaliga væl at slætta sjógv ímillum føroyingar og danir. Meistarliga hevur hann trekt tenninar úr teimum mest víðgongdu føroyingunum - uttan í grundini at lata tað stóra afturfyri.

– Tí sum hann sigur: Tað er ongin orsøk til at sparka eina opna hurð ígjøgnum. Yvirtøkur hava vit altíð kunna framt í tí veruliga politiska lívinum. Men nú so vit so pappír uppá, at tað og tað kann sjálvsagt vera hent, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Vit mugu fáa meiri kjøt á

**–Tað ber illa til at siga nakað um tvørasáttmálan, fyrrenn vit vita, hvat kemur at standa í tí endaligu yvirtøkulógini, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í sambandsflokkinum**

TVØRASÁTTMÁLIN
*Áki Bertholdsen*

– Vit mugu fáa meiri kjøt á. Lisbeth L. Petersen, forkvinna í sambandsflokkinum, sum er í andstøðu sigur, at enn ber illa til at hava nakra meining um fráboðanarætlanina, sum Anders Fogh Rasmussen og Anfinn Kallsberg skrivaðu undir á Tvøroyri hósmorgunin.

– Tvørasáttmálin er so ullintir, at tað ber illa til at hava eina greiða støðu til hann, sigur Lisbeth Petersen.

Hon sigur, at tað, sum hevur tann stóra áhugan hjá sambandsflokkinum, er, hvat kemur at standa í teirri endaligu yvirtøkulógini.

Hon sigur, at sambandsflokkurin heldur, at tað eru nøkur málsøki, sum føroyingar kunnu yvirtaka.

– Men vit hava kortini sett eitt mark, tí vit halda framvegis, at tað eru nøkur mál, sum tað ikki er rætt at yvirtaka.

– Eitt nú halda vit, at Føroyar eru so lítlar, at tað er ikki rætt at yvirtaka løgreglu og rættarmál, tí vit stúra fyri rættartrygdini, tá ið ein so fáment tjóð skal yvirtaka dómsvaldið, tí vit eru ov nær hvørjum øðrum. Lisbeth Petersen sigur, at tann fíggjarligi spurningurin í yvirtøkunum kann eisini gerast eitt mark í sær sjálvum fyri, hvørjar yvirtøkur, sambandsflokkurin vil taka undir við.

– Higartil hevur danski boðskapurin verið, at tað, sum føroyingar yvirtaka, mugu vit sjálvi fíggja og tað verður eisini áhugavert at vita, hvat yvirtøkulógin fer at siga um tann spurningin.

– Tvørasáttmálin er ein ætlan. Fyri okkum verður málið áhugavert, tá ið vit kenna tað ítøkiliga innihaldið í yvirtøkulógini, sum skal setast í gildi á Ólavsøku næsta ár.



*– Tvørasáttmálin er so ullintir, at tað ber ikki til at hava eina meining um hann, fyrrenn vit vita nágreiniliga, hvat kemur at standa í shjálvari lógini, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna sambandsfloksins*